# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Oljan nærkast

Um somu tíð sum Føroyar líkasum standa í eini bíðistøðu, hvat eini framtíðar oljuvinnu viðvíkur, so ber nærum alt til beint eystan fyri markið. Har verður eitt fund gjørt fyri og annað eftir. Og har verður tosað um milliarda útbyggingar komandi árini.

Men seinastu góðu tíðindini frá leitingini vestan fyri Hetland eru so avgjørt eisini kærkomin fyri okkum, nú vit kunnu staðfesta, at oljufund verða gjørd tættari og tættari upp at markinum. Seinasta dømið um hetta er Tornado brunnurin, sum liggur bara tríggjar fjórðingar frá markinum. Frammanundan eru funnar oljukeldur nærum eins nær markinum. Hesar eru Cambo og Rosebank. Og báðar keldurnar eru longu á tekniborðinum við útbygging fyri eygað.

Gongdin við oljuleiting á Atlantsmótinum hevur verið tann nú í mong ár, at tess fleiri fund eru gjørd vestan fyri Hetland, tess størri áhugi hevur verið fyri at gera íløgur á føroyska landgrunninum. Ein kann tí siga, at tað er menningin á bretskum øki, sum líkasum er duraopnarin til føroysku oljuna. Tá stóru keldurnar Foinaven og Schiehallion vórðu funnar í 90-unum hevði hetta nærum magiska ávirkan á Føroyaøkið. Hetta gav føroysku oljumyndugleikunum blóð uppá tonnina og eggjaði teimum stóru altjóða oljufeløgunum til at leita henda vegin.

Síðani blivu boraðir seks brunnar á landgrunninum. Hesir staðfestu eina virkna oljuskipan og okkurt fund varð entá gjørt, men tað lá so djúpt, at tað ikki varð mett ráðiligt at fara eftir oljuni.

Hvat skulu vit so brúka seinasta fundið við markið til kundi verið spurt! At føroyskir íleggjarar eru við í fundinum kann bara vera gott, og er Faroe Petroleum eisini við í komandi boring á landgrunninum.

Vit eiga at gera okkum greitt, at hóast meira enn 10 ár eru farin, síðani fyrstu loyvini vórðu latin, so er nógv hent í økinum sum heild. Og vit eiga avgjørt at eygleiða fundini, sum nærkast markinum sum eitt tekin um, hvat framtíðin hevur at bjóða okkara megin markið. Sannlíkið fyri at olja og gass bara er bretsku megin markið er ómetaliga lítið. Heldur kunnu vit loyva okkum at siga, at tá olja og gass verða funnin so nær framvið markinum yvir ein rættiliga langan tein, so er bara spurningurin um tíð, til fund verða gjørd her eisini. Og verða útbyggingar á teimum trimum leiðunum við markið, so gevur hetta okkum aftur sera góð kort á hondina, tí tá kunnu sjálvt smærri fund gerast lønandi, um vit kunnu gera brúk av infrakervi og framleiðsluútbúnaði í grannalagnum.

Tornadofundið er eins og Glenlivetfundið ein hending, ið stuðlar undir føroysku oljuleitingina, og eingin ivi er um, at bæði okkara oljumyndugleikar og feløg sum StatoilHydro, sum umsita nógv loyvi á landgrunninum, fegnast og síggja seinasta fundið sum av stórum týdningi fyri virksemi á føroyska landgrunninum eisini. Vit kunnu so eisini koma at uppliva, at føroyska oljan verður (ella er?) funnin við leiting á bretskum øki. Óvanligt er ikki, at oljufund ganga tvørtur um mørk. Livst so spyrst.

**Sosialurin**

## Ikki ráð til heilivág



**MORTAN JOHANNESEN**
útróðrarmaður

Fyri fimm vikum síðan, tá eg kom oman í Vágsbotn, vóru havhestaungar at fáa á øllum sølubásunum. Fór yvir til ein vinmann, hann seldi eisini nátar, og hanns egði beinanvegin, at her í Havn er ongin neyð, fólk hava nógvar pengar um hendi. Vit vórðu skjótt samdir um, at í høvuðsstaðnum fáa øll sína føstu løn, sum tey sjálvandi eisini hava uppiborið. Her eru jú flest í almennum ella kommunalum arbeiði. Og lønin fer eisini upp í oktober.

Meðan vit tosa saman kemur ein gomul kona yvir til okkum. Hon gongur seint, hevur stav í hondini og haltar. Gamla konan spyr lítilláta, um hon kann keypa ein hálvan havhestaunga. Nú var heilivágurin, hon mátti taka hvønn dag, blivin so dýrur, tí tann stuðul, hon hevði fingið, var tikin burtur, so nú hevði hon illa nokk pening til tað mest neyðturviliga. Vinmaðurin sigur, at teir plagdu ikki at selja hálvar havhestaungar. So hetta var fyrstu ferð, síðan hon var ung, at hon ikki hevði smakkað náta, sigur gamla konan og fór syrgin frá okkum.

Vinmaðurin er kvikur, tekur ein heilan havhestaunga, koyrir hann í ein posa og gevur konuni hann og sigur, at tað skal onki kosta. Tað var hjarta-nemandi at síggja ta gleði og takksemi, sum skein úr eygnum á hesi gomlu konu.

Henda hending fekk meg at hugsa um tey ísakøldu landsstýrisfólk, sum leggjast eftir teimum sjúku, gomlu, veiku, óhjálpnu og teimum minni mentu, sum øll hava brúk fyri hjálp. Tað verður tikið frá teimum fyri at spara. Hesi fólk hava ikki møguliga at rópa upp og hótta við blokadum ella verkfalli, sum aðrir bólkar gera, og sum bæði løgtingsfólk og landsstýrisfólk hokna undan sum rustaðir seymir, tá hótt verður við slíkum.

Hvar er visión 2015, at øll skulu hava tað gott? Jú, landsstýrisfólk fingu fyri nøkrum árum síðan hækkað sína eftirløn. Tað bleiv gjørt yvir eitt vikuskifti, so var tað í lagi. Og nú aftur lønarhækking. Men hvat við gomlu konuni, sum ikki átti fyri heilivág?

## Ikki landsins politikarar, men landsstýrið eigur ábyrgdina!



**BJØRT SAMUELSEN**
Løgtingskvinna, Tjóðveldi

**Í annars beinraknum tíðindaskrivi langar Vinnuhúsið eftir einari samlaðari politiskari skipan, heldur enn leggja ábyrgdina har hon eigur - hjá sitandi landsstýri. Partar av politisku skipanini ynskja nevniliga ikki at sleppa undan at taka óupulerar avgerðir, men vilja nettupp gera neyðugar bygnaðarligar broytingar, soleiðis at landskassans inntøkur verða munandi meira stabilar**

Eitt er púra vist. Tjóðveldi, ynskir ikki at eiga allar minsta lut í tí vinnupolitikki, sum førdur verður av sitandi samgongu. Sum undirritaða eisini bar fram í sambandi við 1. viðgerð av fíggjarlógaruppskotinum fyri 2010, so er sera stór andsøgn ímillum tey málini, sum ymisk landsstýrisfólk profilera seg við í fjølmiðlunum, og so tann fíggjarpolitikk, sum stungin er í kortið.

Vit fáa at vita, at nógvir pengar eru settir av til at marknaðarføra Føroyar sum ferðamannaland. Og vit fáa at vita, at arbeitt verður við at minka ferðaseðlaprísirnar. Men í næstu løtu hækka ferðaavgjøldini. Eisini verða Føroyar marknaðarførdar sum íløguland, men samstundis fer Fíggjarmálaráðið beint eftir alivinnuni, sum er klár at fara á børsin, og skattar hesa vinnu, uttan so mikið sum at skeita eftir, at hetta gevur enn størri mismun ímillum alivinnuna og fiskivinnuna annars. Samstundis verður mismunur gjørdur á fíggjar- og tryggingarvinnuni í mun til aðrar vinnur. Føroyska vinnan hevur í løtuni als ikki eins karmar og treytir at virka undir. Tað tykir sum høgra hond ikki veit, hvat vinstra ger. Og her eru nógvar hendur, tí vinnumál eru nú spjødd um trý ymisk aðalráð: Vinnu-, Fiskivinnu- og Uttanríksiráðið, umframt at tað er tað fjórða - Fíggjarmálaráðið - sum setur karmarnar.

Sitandi landsstýri hevur tíverri víst, at tað hevur eingi boð uppá størri bygnaðarligar broytingar - eitt nú í fiskivinnuni, so hendan kann geva stórt yvirskot, og í búskaparpolitikkinum verða bert smærri broytingar gjørdar, sum ikki nøkta tørvin at gera landskassans inntøkur minni viðbreknar fyri búskaparsveiggi.

Vinnuhúsið skrivar at: "Í Føroyum sær tað út til, at landsins politikarar ætla at økja um inntøkur landskassans við at økja um gjøld á vinnuna. Hetta fyri at sleppa undan at taka óupulerar avgerðir, sum eru at minka almennu útreiðslurnar". Fari at vísa Vinnuhúsinum á, at tað ikki eru "landsins politikarar", men sitandi stjórn, sum hevur ábyrgdina av rikna politikkinum.

Men, eg skilji hví eisini Vinnuhúsið er farið at ivast í, hvar ábyrgdin skal plasserast. Tí landsstýrið stendur ikki aftanfyri sítt egna fíggjarlógaruppskot, og harvið er tað litið upp í hendurnar á "landsins politikarum" at gera av, hvussu raðfestast skal. At ein stjórn kann sleppa undan ábyrgd av egnari fíggjarlóg má vera eindømi, og eg skilji ikki, at tað letur seg gera.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.